Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 21.06.2018 kl. 20:00 |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Hanna Jensen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 42/18 | 17/00009-13 | Tilmæli - Bygging av neystum, skúrum, lugari, almennum vesi og brúsu v.m., matr. nr. 169a í Leirvík | 3 |
| 43/18 | 17/00339-3 | Uppskot til neystabygging í Norðragøtu | 6 |
| 44/18 | 18/00030-2 | Mál 18/00030 Umsókn um at leiga matr. 187a á havnalagnum í Norðragøtu. Tilmæli og málslýsing | 9 |
| 45/18 | 18/00127-1 | Tilmæli til - Asfaltarbeiði 2018 | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 46/18 | 18/00190-3 | Mál 18/00190 Keyp av pressubingju. Málslýsing og tilmæli | 14 |
| 47/18 | 18/00232-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál - 18/00232 Viðgerð av uppskoti til Barna - og ungdómspolitikki í Eysturkommunu | 16 |
| 48/18 | 18/00243-5 | Tilmæli til mál 18/00243 - Jarðhitaskipan í Leirvík | 19 |
| | | | |

## 42/18 Tilmæli - Bygging av neystum, skúrum, lugari, almennum vesi og brúsu v.m., matr. nr. 169a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.10.2017 | 52/17 | 17/00009-13 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.10.2017 | 54/17 | 17/00009-13 |
| 3 Býráðið | 30.10.2017 | 78/17 | 17/00009-13 |
| 4 Býráðið | | | 17/00009-13 |
| 5 Vinnunevndin | 11.06.2018 | 19/18 | 17/00009-13 |
| 6 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 17/00009-13 |
| 7 Fíggjarnevnd | 19.06.2018 | 51/18 | 17/00009-13 |
| 8 Býráðið | 21.06.2018 | 42/18 | 17/00009-13 |

**Málslýsing:**

TU hevur tosað við umboð fyri fyritøkuan Sp/f BMT um arbeiðstøkuna, prísir og tíðaræltan.

Skal her upplýsa, at tilboðini ið komu inn vóru:
KBH 3.620.113,00 kr. uttan mvg, + el-arbeiðstøkan ið vit meta kostar 150.000,00 kr. + óvænta 150.000,00 kr.
Kostnaðarmetingin frá SNA er 3.475.000,00 kr. uttan mvg, + el-arbeiðstøkan ið vit meta kostar 150.000,00 kr. + óvænta 150.000,00 kr.

Sp/f BMT hevur givið okkum prís upp á betong, timbur, snikkara, kloakkleiðingar, brunnar, køk, vaskimaskina og turkitrumla, vesir, ovn v.m., íroknað 4 skúrðarnar, t.v.s. allan bygningin móti báhylinum (ikki 2 neyst sum eru millum verandi neyst og lugarið) uppa kr. 1.863.480,00 kr. uttan mvg.
Herumframt skal elarbeiðstøkan, málaraarbeiðstøkan og HVS leggjast afturat og verður mett til 450.000,00 kr. uttan mvg + 150.000,00 kr. til óvænta útreiðslur.
Samlað kostnaður fyri lugarið, almenn vesir, brúsir og 4 skúrðar 2.463.480,00 kr. uttan mvg.

Skúrðarnir kunnu seljast fyri 150.000,00 kr. stk. og komandi 2 neyst ið skulu byggjast, skulu gjalda nakað fyri betongveggin, sum verður gjørdur í hesari arbeiðstøku.

Sp/f BMT upplýsir, at teir hava kannað eftir hvussu tíðarætlan fyri nevnda arbeiðstøku og flutt um uppá nøkur arbeiði í kalendaranum. Fær BMT skjótt svar, kann byrjast upp á arbeiðstøkuna fyrst í november og alt betongarbeiðið er liðugt áðrenn jól.

Vit tosaðu eisini um møguleika og kostna at byggja lugarið, vesi og brúsirúmið, hetta er eisini møguligt, men er eisini tann dýrari parturin í arbeiðstøkuni.
Skúrðarnir verða nógv bíligari at byggja saman við lugarinum, tí forskalling, leiga av

formum, flutningur, byggipláss v.m. er ein sparing. Tilboð frá BMTog annar kostnaður, er 1,5 mill. kr. bíligari enn innkomið tilboð.

**Ískoyti 11.06.2018**
Arbeiðið at gera nýggja Lugarið í Leirvík gongur væl.

Innrætting av ovaru hædd og uttanumøkið í nýggja Lugarinum í Leirvík, var ikki við í sáttmálin, sum bleiv undirskrivaður við arbeiðstakara.
Hetta var tí, at tað ikki var avgjørt, hvussu Lugarið endaligt skuldi verða.

Nú er arbeiðið við at verða liðugt, og ovara hædd og uttanumøkið skal gerast.

Eysturkommuna hevur fingið tilboð áljóðandi á 165.000 kr. fyri liðuggerð av ovaruhædd og 60.000 fyri at leggja betongflisar uttanfyri (oman móti sjónum).

Tað vil siga, at tað tilsamans krevur eina eykajáttan á 220.000 kr. um hetta skal gerast.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2017 eru avsettar kr. 700.000,00 kr. Skal omanfyri nevnda verkætlan fremjast, verður biðið um eykajáttan uppá kr. 1.2 mill. kr. (tá er søla av 4 skúrðin á kr. 150.000,00 mótroknað). Upphæddirnar eru uttan mvg.

**Ískoyti 11.06.2018**
Tað krevur eina eykajáttan á 220.000 kr. um arbeiðið skal gerast.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at gera sáttmála við Sp/f BMT og byrja uppá arbeiðið í november 2017.

**Ískoyti 11.06.2018**
Umsitingin mælir til at man fær eina eykajáttan og ger arbeiði.
Arbeiðið, sum er í gongd, verður liðugt í endanum í juni. Um eykajáttan verður givin, verður alt arbeiðið liðugt í juli 2018.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 20. oktober 2017**
Mæla til at gera avtalu við Sp/f BMT um at byggja lugarið v.m. og játta manglandi upphædd á fíggjarætlan fyro 2018 til prosjektið.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 25. oktober 2017**
Mæla ti at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 30. oktober 2017**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevnidi og fíggjarnevndini.

**Viðtøka Vinnunevndin 11. juni 2018**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mælir til eina eykajáttan á 220.000 kr. til endamálið.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 19. juni 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini. Peningurin verður tikin av innistandandi.

**Viðtøka Býráðið 21. juni 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

Málið skal í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar áðrenn tað verður byrja.

## 43/18 Uppskot til neystabygging í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 11.06.2018 | 15/18 | 17/00339-3 |
| 2 Býráðið | 21.06.2018 | 43/18 | 17/00339-3 |

**Málslýsing:**

Málið var fyri á býráðsfundi 31.08.2017

Tá bleiv skotið upp at:

1. *At kommunan gevur loyvi til at byggja neyst millum vegin "Tróndargøta" og vegin framvið havnarlagnum. Skotið verður upp, at byrja verður við tað sama, og so uttaliga sum møguligt og inn móti uml. helvtina av hesum stykkinum. Til. uml. Trónadargøtu 59. (sí viðlagda kort)*

2. *At frá Tróndargøtu 59 og inn til Tyrlhúsgrundina verður ein serstøk byggisamtykt gjørd, har m.a. hæddirnar av komandi neystum verður sett í mun til grannalagið á Tróndargøtu.*

3. *At Tyrlhúsgrundin verður nýtt til eitt fríðøkið, og ikki til neystabygging.*

4. *At tey sum eiga neyst á Oyruni, fáa boði neystagrundir sbrt. hesum uppskotið við tað sama, so neystini á Oyruni kunna vera tikin niður, eins og avtala er við teir eigaranar.*

Tá bleiv einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum, tó verður punkt 3. strikað.

**Ískoyti 11.06.2018**

Serstøk byggisamtykt fyri økið frá Tróndargøtu 59 til Tróndargøtu 45 í Norðragøtu (sí viðheft kort).

Skotið verður upp at serstaka byggisamtyktin skal ljóða soleiðis:

Ásetingar fyri øki G2: Neysta- og vinnuøki við serstakari byggisamtykt.

Økið verður lagt av til neysta- og vinnubygging, ið hóskar til umhvørvi, har byggingin fer fram. Umhvørvisflokking er til lættari vinnu í umhvørvisflokki 1 og 2.

Økið er lagt av til neyst, ið hava pláss til bát, og neystabygging, sum lutvíst kann innrættast til frítíðarhús.
Treytin fyri at loyva frítíðarhúsi/bústaði í neysti er, at umstøður skulu vera til at hava bát í neystinum, og innrættingin til frítíðarhús/bústað, ikki er á niðastu hædd, umframt at nøktandi rýmingarmøguleikum skulu vera eftir galdandi reglum.

Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd við nýttum lofti, neysti skal hava mønu, sum er á miðjuni á takinum, og hægsta punkt á mønuni, má ikki fara meir enn 0,5m upp um kotuna, sum er ájavnt við vegnum á Tróndargøtu.

Býráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí, t.d. tá talan er um verandi bygning hevur øðrvísi snið, enn ásett í byggisamtyktini.

| |
|---|
| Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús/bústað, skulu íbindast skipaða kloakk, sum verður rindað av neystaeigarunum.<br><br>**Byggisamtykt fyri Tyrlhúsgrundina** (Sí viðheft kort).<br>Tyrlhúsgrundin verður lagt av til øki F: Almen frítíðar- og mentanarøkið. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fíggjarligu avleiðingar eru mettar til 20.000 kr., tað fevnir um broyting í tekningum og kostnaður til Umhvørvisstovuna, fyri broyting í berandi byggisamtykt. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at broyta byggisamtyktina. |

**<u>Viðtøka Vinnunevndin 11. juni 2018</u>**
Meirilutin í Vinnunevnini, við Hannu Jensen og Gudny Langgaard, taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mæla til at broyta byggisamtyktina.

Minnilutin, Hjalti Dalheim, tekur undir við meirilutanum, tó við tí broyting, at Tyrluhúsgrundin verður framhaldandi neystaøki, við serstakari byggisamtykt.

**<u>Viðtøka Býráðið 21. juni 2018</u>**

**Broytingaruppskot:**
Jóan Christiansen mælir til at beina málið aftur í nevnd til viðgerðar.

Fyrst bleiv atkvøtt um at beina málið aftur í nevndi og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Hanna Jensen,
**Atkvøður ímóti:**
Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Árni Jacobsen, Tollakur Joensen.

Sostatt er samtykt at málið veður ikki beint aftur í nevnd til viðgerðar

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í vinnunevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Hanna Jensen,

**Atkvøður ímóti:**
Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Árni Jacobsen, Tollakur Joensen.

Sostatt er tilmæli hjá meirlutanum í vinnunevndini fallið.

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá minnilutanum í vinnunevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Árni Jacobsen Tollakur Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Hanna Jensen, øll við tí viðmerking at:
*Møguleikarnir fyri at byggja neyst í Norðragøtu eru nógvir, men tað er bert eitt økið klárt á havnalagnum til ferðavinnu, mentan og trivnað, og tað er "Trylhúsgrundin" sum eigur at verða brúkt til tað endamálið.*

Sostatt er tilmæli hjá minnilutanum í vinnunevndini samtykt.

*Hans Mourits Foldbo var úti undir viðgerðini ógegni.*

## 44/18 Mál 18/00030 Umsókn um at leiga matr. 187a á havnalagnum í Norðragøtu. Tilmæli og málslýsing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | | | 18/00030-2 |
| 2 Vinnunevndin | 11.06.2018 | 16/18 | 18/00030-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.06.2018 | 50/18 | 18/00030-2 |
| 4 Býráðið | 21.06.2018 | 44/18 | 18/00030-2 |

**Málslýsing:**

Umsókn er komin inn frá fyritøku um at leiga áleið 5000 fermetrar av matr. Nr. 187a á havnalagnum í Norðragøtu. Fyritøkan hevur longu stórt virksemið á økinum og úti á Gøtuvík. Økið verður í høvuðsheitum brúkt til at umvæla aliringar. Fyritøkan hevur givið ábendingar um at núverandi atgongd til matr. Nr. 187a lættir ómetiliga væl um arbeiðið at umvæla aliringar, men samstundis hevur fyritøkan onnur øki í Føroyum, sum fyritøkan eisini kann nýta til endamálið.

Fyritøkan hevur givið ábendingar um at virksemið úti á Gøtuvík verður tvífalda komandi árini. Harumframt hevur fyritøkan givið ábendingar um, at býtislykilin fyri t.d. partafelagsskatt til Eysturkommunu veksur tilsvarandi.

Leigan fyri vinnuøki á havnalagnum í Norðragøtu er 16,50 kr pr. fermetur, og t.v.s. at leiguinntøkan fyri 5000 fermetrar verður 82.500 kr. árliga.

Matr. nr. 187a á havnalagnum í Norðragøtu er ikki asfalterað og hevur hetta møguliga ávirkan hvussu økið verður virt. Oftani er órudd á økinum og sær til tíðir óinnbjóðandi út.

Í líknandi málið (Mál 14/00389 Umsókn um leigu av norðasta parti av grótbrotinum í Norðragøtu) hevur umsitingin mælt frá at asfaltera leiguøkið grundað á fylgjandi:

"Tey vinnustykkini sum vit leiga til t.d. Tavan, Fofish, Føroya Bjór og Fiskavirkið eru sambært byggisamtyktini D-øki, og her er tað blivið asfalterað kring virkisbygningar.
Grótbrotið í Norðragøtu er C2 øki, og á C2 økjum er ikki asfalt í løtuni. Eysturkommuna leigar harumframt vinnuøki út á Kráartanga, sum er C2 øki, og her er onki asfalt. Onnur C2 økir eru vinnustykkið í Gøtudali og havnalagið undir Gøtueiði. Eitt undantak við C2-øki er leiguøkið við Toftanes. Hetta økið er tó upprunaliga asfalterað til parkering í samb. við Ternuna og ferjuleguna. Harumframt er ongin játtan til at asfaltera C2 øki".

Her skal viðmerkjast afturat, at virkini sum standa á D-økjum gjalda eisini 16,50 kr. í leigu pr. fermetur.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at leiga 5000 fermetrar út til fyritøkuna á matr. nr. 187a í Norðragøtu. Hetta skal gerast við teirri treyt, at sáttmálin kann uppsigast innan eitt rímuligt tíðarskeið, um onnur verkætlan skal á breddan.

Er politiskt ynski um at fríðka um matr. nr. 187a í Norðragøtu, verður mælt til at støða verður tikin til, um økið skal asfalterast. Her skal hædd takast fyri, um onnur C2 øki til leigu eisini skulu asfalterast.

**<u>Viðtøka Vinnunevndin 11. juni 2018</u>**

Vinnunevndin tekur undir við at loyva fyritøkuni at leiga 5000 fermetrar á matr. 187a, tó við tí møguleika, at sáttmálin kann uppsigast við stuttari freist (t.d. 3- ella 6 mánaðar freist).

Vinnunevnin mælir til at umsitingin kannar kostnaðin av at fríðka matr. 187a í Norðragøtu, herundir at rætta grótkantin móti sjónum.

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 19. juni 2018</u>**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**<u>Viðtøka Býráðið 21. juni 2018</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

## 45/18 Tilmæli til - Asfaltarbeiði 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.03.2018 | 13/18 | 18/00127-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.03.2018 | 24/18 | 18/00127-1 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.05.2018 | 21/18 | 18/00127-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 23.05.2018 | 43/18 | 18/00127-1 |
| 5 Býráðið | 28.05.2018 | 36/18 | 18/00127-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 48/18 | 18/00127-1 |
| 7 Fíggjarnevnd | 19.06.2018 | 53/18 | 18/00127-1 |
| 8 Býráðið | 21.06.2018 | 45/18 | 18/00127-1 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hjá Eysturkommunu hevur gjørt eina meting av asfaltarbeiðið, sum treingir til at verða gjørt.

Talan er um økini:

- Úti í Bug 48.600,-
- Á Bakka 240.000,-
- Leirvíksvegurin 100.000,-
- Húsgarðsvegurin 450.000,-
- Fyri oman Brúgv 300.000,-

Samanlagt er prísurin mettur til at verða 1.138.600 kr.

Havast skal í huga at, hetta eru metingar, og tí er ikki vist hvat endaligu prísur verður, fyrr enn tilboð er innheintað frá evt. arbeiðstakara.

**Ískoyti 23.04.2018**
Málið var fyri í Byggi- og býarskipanarnevndini 16. mars, har bleiv mælt til at umsitingin skuldi gera eina heildarætlan fyri asfaltarbeiðið, sum krevur at gerast í kommununi.

**Ískoyti 18.05.2018 (BOB)**
Umsitingin hevur gjørt eina raðfesting fyri asfaltarbeiði í Eysturkommunu frá 2018 til 2021.

## Raðfesting av asfalt í Eysturkommunu

| Øki | Vídd | kr/m$^2$ | | raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| Húsgarðsvegurin SG | 2040 | kr. 300,00 | kr. 611.913,72 | 2018 |
| Fyri oman Brúgv SG | 1073 | kr. 250,00 | kr. 268.266,30 | 2018 |
| Á Bakka LV | 1134 | kr. 300,00 | kr. 340.061,73 | 2018 |
| **samla 2018** | | | **kr. 1.220.241,75** | |
| Tollaksgøta, frammvið havnalagnum NG | 1434 | kr. 300,00 | kr. 430.312,73 | 2019 |
| Garðsvegur, niðan til Petur Jakke LV | 2251 | kr. 300,00 | kr. 675.355,11 | 2019 |
| Líðarvegur LV | 2632 | kr. 300,00 | kr. 789.556,84 | 2019 |
| Víkarvegur til rørportri LV | 1597 | kr. 300,00 | kr. 479.017,58 | 2019 |
| **samla 2019** | | | **kr. 2.374.242,26** | |
| Deildarvegur SG | 1838 | kr. 300,00 | kr. 551.450,87 | 2020 |
| Tollaksgøta, út til havnalagið NG | 1809 | kr. 300,00 | kr. 542.719,14 | 2020 |
| Heiðriksmørk LV | 1226 | kr. 300,00 | kr. 367.881,00 | 2020 |
| Sporamørk, út til Víkarveg LV | 2852 | kr. 300,00 | kr. 855.465,61 | 2020 |
| **samla 2020** | | | **kr. 2.317.516,61** | |
| Biskupsmerkur LV | 1176 | kr. 300,00 | kr. 352.791,80 | 2021 |
| Eyðargøta NG | 1608 | kr. 300,00 | kr. 482.522,73 | 2021 |
| **samla 2021** | | | **kr. 835.314,53** | |

Afturat hesum er arbeiðið at asfaltera vegin, sum gongur út til J+H Betong í Leirvík gjørt. Arbeiðið bleiv sett ígongd, tí at vegurin var sera slitin, og arbeiðstakari, sum hevði givið tilboð uppá arbeiðið, kundi gera tað beinanveg.

Tað kostaði 100.000 kr. og teir pengarnar koma at mangla í rakstrinum hjá okkum seinni í ár, um vit ikki fáa eina eykajáttan fyri hetta.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Fyri at asfaltera "Húsgarðsvegin" og "Fyri oman Brúgv" í Syðrugøtu og "´Á Bakka" í Leirvík krevur ein eykajáttan.
Metingin hjá umsitingini fyri hesi arbeið eru 1.220.242 kr. + 100.000 fyri arbeiðið, sum er gjørt í Leirvík.

Tað vil siga at ein eykajáttan á 1.320.242 kr. er neyðug, um hesi arbeið skulu gerast í 2018.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til innheintað tilboð og fáa økini "Húsgarðsvegurin" og "Fyri oman Brúgv" í Syðrugøtu og "´Á Bakka" í Leirvík asfalteraði í 2018.

**Ískoyti 8. juni 2018**

Umsitingin hevur innheintað tilboð uppá arbeiðini. Biðið var um tilboð frá 3 veitarum, og 2 lótu tilboð inn teir vóru E.M Asfalt og Kreton.

Umsitingin mælir til at taka av lægra tilboðnum sum er frá E.M Asfast uppá íalt 1.0003.600,00 kr. umframt mvg.

**Ískoyti 14. Juni 2018 – 2.viðgerð av eykajáttan**
Á býráðsfundi tann 23. mai varð samtykt at veita eykajáttan á 1.371.000,00 kr. Eingin broyting er frá 1. viðgerð

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 16. marts 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fáa eina heildarætlan yvir asfaltarbeiði í allari kommununi.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. marts 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 18. maj 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 23. maj 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og harumframt at gera vegin úti í Bug í Leirvík. Samlaða eykajáttanin verður sostatt 1.371.000,00 kr.

**Viðtøka Býráðið 28. maj 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018**
Einmælt samtykt at taka av lægsta tilboðnum uppá arbeiðið í Syðurgøtu sum er sum er frá E.M Asfalt, og lægsta tilboðnum uppá arbeiðið í Leirvík sum eisini er frá E.M Asfalt

**Viðtøka Fíggjarnevnd 19. juni 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at veit eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Viðtøka Býráðið 21. juni 2018**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

## 46/18 Mál 18/00190 Keyp av pressubingju. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.05.2018 | 14/18 | 18/00190-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.05.2018 | 38/18 | 18/00190-3 |
| 3 Býráðið | 28.05.2018 | 34/18 | 18/00190-3 |
| 4 Fíggjarnevnd | 19.06.2018 | 52/18 | 18/00190-3 |
| 5 Býráðið | 21.06.2018 | 46/18 | 18/00190-3 |

**Málslýsing:**

Í verandi støðu hava vit 4 bingjur á 10 kubik á endurnýtsluni í Norðragøtu. Hetta vísir seg at vera ov lítið, og er hetta byrjað at blíva ein avbjóðing síðani í fjør summar.
Hetta sæst kanska serliga aftur í vikuskiftum, tá vit við núverandi nøgdum av ruski ikki klára at taka undan.
Bingjurnar verða fullar ov skjótt og so má endurnýtslan stongja áðrenn tíð.

Hesin trupulleikin kann loysast við at keypa eina pressubingju. Mett verður at ein pressubingja á 18 kubik kann loysa hendan trupulleikan, við tað at hon pressar uml. 7 ferðir volumina.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Í 2016 fekk umsitingin prís frá VARIG á eina SPB 18 SEL pressubingju, sum umsitingin metur er hóskandi. Prísurin er 170.000 kr. + flutning og montering. Mett verður at samlaði kostnaðurin verður áleið 210.000 kr.
9. mai:
IRF hevur givið ein prís á pressbingju 172.000 kr. leverað í Hirtshals. Mett verður eisini her, at samlaði kostnaðurin verður áleið 210.000 kr. Leveringstíðin er 10 vikur. Hendan pressbingjan er sama slag sum aðrar kommunur brúka.

Ongin upphædd er sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2018.

**Ískoyti 14. Juni 2018 – 2. viðgerð av eykajáttan**
Á býráðsfundi tann 28. mei varð samtykt at veita eykajáttan á 210.000,00 kr. Eingin broyting er frá 1. Viðgerð

**Tilmæli**

Tørvurin á einari pressbingju er stórur, og væntast kann at tørvurin veksur í framtíðini. Tískil mælir umsitingin til at pressbingja verður keypt.

### Viðtøka Vinnunevndin 14. maj 2018

Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mælir til at keypa eina pressubingju.
Samstundis ætlar VN at fara undir at samskifta við IRF um umhvørvissvinaligari renovatión.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 23. maj 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og veita eykajáttan til keypið. Peningurin verður tikin av innistandandi.

**Viðtøka Býráðið 28. maj 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 19. juni 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1.viðgerð

**Viðtøka Býráðið 21. juni 2018**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

## 47/18 Frágreiðing og tilmæli til mál - 18/00232 Viðgerð av uppskoti til Barna - og ungdómspolitikki í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 11.06.2018 | 8/18 | 18/00232-1 |
| 2 Býráðið | 21.06.2018 | 47/18 | 18/00232-1 |

**Málslýsing:**

Á býráðsfundi 21. august 2017 varð samtykt at taka undir við tilmæli frá trivnaðarnevndini at fara at gera ein "Barna – og ungdómspolitikk" fyri Eysturkommunu.

Lagt var upp fyri, at ein so breiður skari av áhugafólki/bólkum sum gjørligt, fingu møguleikan at verða partur arbeiðinum, fyri soleiðis at gera tilgongdina gjøgnumskygda og fyri at áhugapartarnir soleiðis kundu kenna ognarskap fyri uppskotinum og tí nú lidna arbeiðinum.

Í stuttum kann sigast, at 137 børn, ung og vaksin hava luttikið og eru komin við teirra hugsanum og íkasti at orða barna- og ungdómspolitikkin í Eysturkommunu.

**7 verkstovur hava verið umboðandi:**

- Børn frá 4. - 10. flokk,
- Foreldraumboð,
- Starvsfólkini á dagstovnunum,
- Starvsfólkini á frítíðarheiminum,
- Lærarar,
- Heilsustarvsfólk,
- Barnavernd,
- Umboð úr frítíðarfeløgum,
- Umboð fyri mentan,
- Umboð úr kirkjum og samkomum,
- Umboð úr umsitingini í kommununi

Eisini ein Hugbanki hevur arbeitt við tilfarinum í 3 dagar. Hugbankin var umboðandi:

- Dagstovnar
- Frítíðarskúla

- Lærarar
- Foreldraumboð
- Heilsustarvsfólk
- Barnavernd
- Umboð fyri frítíðarfeløg
- Umboð fyri mentan
- Umboð fyri samkomur
- Umboð frá umsitingini

Eftirfylgjandi hevur so trivnaðarnevndin gjøgnumgingið, rættlisið og gjørt tillagingar i uppskotið, sum kom frá Hugbankanum.

Hugbankin hevur so fingið møguleikan til hoyring í mun til gjørdu tillagingarnar trivnaðarnevndin hevur gjørt, og var freistin at koma við viðmerkingum mánadagin 04. juni 2018.

Endaligt uppskot til ein "Barna – og ungdómspolitikk" liggur nú klárt at viðgera av politiska myndugleikanum.

Trivnaðarnevndin hevur gjørt av, at lata upp fyri møguleikanum , at "Barna- og Ungdómspolitikkurin" skal kallast okkurt annað, og hevur givið Hugbankanum møguleikan at koma við hugskotum til eitt heitið. Tað verður Trivnaðarnevndin, ið kemur við tilmæli um endaligt heiti.

Freistin at koma við uppskotum til eitt møguligt heiti er sunnudagin 10. juni 2018.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskotið til barna- og ungdómspolitikk og at støða verður tikin til eitt endaligt heiti. |

**<u>Viðtøka Trivnaðarnevndin 11. juni 2018</u>**

Mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til barna – og ungdómspolitikk og at støða til heiti verður tikin á fyrst komandi býráðsfundi

**<u>Viðtøka Býráðið 21. juni 2018</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til barna- og ungdómspolitikk.

Heiti verður: *Børn og ung – okkara felags ábyrgd*

## 48/18 Tilmæli til mál 18/00243 - Jarðhitaskipan í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.06.2018 | 24/18 | 18/00243-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 18/00243-5 |
| 3 Býráðið | | | 18/00243-5 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 18/00243-5 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.06.2018 | 54/18 | 18/00243-5 |
| 6 Býráðið | 21.06.2018 | 48/18 | 18/00243-5 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í framhaldi av verkætlanini um sjóhita/jarðhita í Leirvík, sum blev gjørd av Jarðfeingi, Cowi og Fríðfinni Johnsson, hava umboð fyri kommununa, Fríðfinnur og Jarðfeingi arbeitt við hvussu man e.v.t. kann koma víðari. Fundur hevur eisini verið við Cowi.<br><br>Hugt hevur verið eftir hvørjir kommunalir bygningar eru sum kundu verið knýttir í eina jarðhitaskipan. Sum nú er, er talan um 6 bygningar, sum í 2017 brúktu uml. 97000 litar av olju, sum svara til til góðar 650 t.kr. við núverandi oljuprísum. Komandi ár verður so tilbúgvingarstøðin liðug, og kann hon tá eisini knýtast í skipanina, møguleiki verður eisini hjá privatum húsarhaldum sum eru nærhendis at knýta í skipanina.<br><br>Fyri at fáa eitt eitt uppskot til hvussu ein evt skipan skal verða og hvat hon kostar, hevur fundur verið við Cowi og hava teir bjóða set til at gera eitt uppskot, sum er klárt at leggja fyri býráðið til støðutakan fyri 89.000,00 kr. (sí hjál. uppskot til avtalu). |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eingir pengar eru avsettir til hetta á fíggjarætlanini. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at gera avtalu við Cowi um arbeiðið. |

### Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. juni 2018
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

### Viðtøka Fíggjarnevnd 19. juni 2018
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá bygg- og býarskipanarnevndini. Peningurin verður tikin av innistandandi.

### Viðtøka Býráðið 21. juni 2018
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 22.30

Jóhan Christiansen

Hanna Jensen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen